# Nei takk til næstakærleika

MAUD WANG HANSEN



Ørnin, sum eirindaleys rænir og týnir sakleysar skapningar, situr á hægsta tindi, friðað og sorgleys. Tað sýnist, sum skilir hon ikki, hvussu stórt mein hon ger. Hennara gløgga eyga veit júst, hvar hon skal leggja á næstu ferð. Hon velur sær neyvt tey offur, sum onga mótstøðu gera, og sigursæl situr hon eftir og kennir seg sum kong.

Tað er ógjørligt við vanligum orðum at siga hvussu fast tað tekur at sita og hyggja at teim sorgarleikum, sum fara fram millum okkara veikastu borgarar.

Eg fari tí at tríva í røðuna hjá løgmanni, Kaj Leo Johannesen, sum hann helt í Norðurlandahúsinum 8. oktober 2009, á ráðstevnu hjá MBF um sektorábyrgd.

Citat byrjar: "Í okkara samfelag skulu øll hava javnbjóðis møguleikar. Øll skulu hava møguleika at skapa sær eina gevandi tilveru. Øll, eisini tey sum bera brek. Hetta er grundvøllurin undir einum góðum samfelag. Hetta er eitt aðalmál hjá samgonguni og landsstýrinum."

"Men orð mugu fremjast í verki, og skulu føgru orðini í sáttmálanum gerast veruleiki, mugu vit politikarar fremja tey tiltøk, sum eru neyðug fyri at tryggja fólki við breki og menningartarni betri og virðiligari kor."

"Tað almenna skal veita tænastur og hjálpa samfelagsbólkum við serligum tørvi. Men tað eru ikki bara almennir stovnar, sum skulu vísa næstakærleika í verki. Tí verður næstakærleikin bert framdur við paragraffum, missur næstakærleikin sítt sanna virði. Vit sum einstaklingar eiga ábyrgd at vísa okkara medmenniskjum umsorgan. Vit hava øll ábyrgd fyri okkara samfelag. Vit hava øll ábyrgd av hvørjum øðrum." Citat endar.

Hesi orð siga alt.

Eg spyrji bara, hvat er gjørt, síðan henda røða varð hildin?

Einki, sum eg dugi at síggja. Ein ræðusøga fyri og onnur eftir eru frammi í fjølmiðlunum. Søgurnar eru ikki uppfunnar, tær eru sannar, og nógv er, sum ikki verður sagt, tí tað er ov pínufult.

Eitt samfelag verður mett eftir tí, tað ger fyri tey veikastu.

- -1. Vit hava dømi um, at familjur at børnum við serligum tørvi eru kroyst til kníggja, tí eingin skipan er, sum tekur atlit til hesi børn og ungu.
- -1. Næmingar á skúla ella viðgerðartilboði uttanlands vera tiknir heim mitt í skúlaárinum, uttan at nøktandi tilboð er tøkt heima.
- -1. Rókin og Slóðin skulu flyta, og øll starvsfólk á Slóðini eru uppsøgd. Hvar skulu hesi viðkvomu ungu búgva, og hvør skal vera um tey? Tey hava rætt at vita!
- -1. Pensjónistar skulu við eitt gjalda 2.000,- kr. meira um mánaðin fyri at búgva á sambýli.

Hetta eru bert nøkur fá dømi, tí eg havi mist talið á øllum inntrivum, sum gjørd eru seinastu tíðina. Eg havi eina ringa kenslu í kroppinum, meðan eg siti og skrivi, tí tað er so vónleyst, tá ið tað alsamt eru tey veikastu, sum verða rakt.

Familjan er kraftsentur í einum hvørjum samfelag, og føroyskar familjur bera manga byrðu, sum tung er, uttan at grenja. Tí eiga føroyskar familjur tøkk uppiborna fyri áhaldandi at taka sær av sínum, meðan samfelagið ikki slær til.

Er tað so, sum løgmaður sigur, at tað eru almennir stovnar og paragraffir, sum vísa næstakærleiki, so er eftir mínari meining best, um eingin næstakærleiki verður vístur teimum, sum tørva hann mest.

Eg gráti um førda politikkin og skilji ikki, at landsins ráðandi kunnu hyggja seg sjálvi ella nakran annan í eyguni longur.

# Skjót ikki journalistin!

KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður
Sjálvstýrisfloksins



Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum og formaður javnaðarfloksins, er nú farin í hernað ímóti journalistum í Føroyum, serliga ringu samvitsku síni á Sosialinum.

Fyrrverandi løgmaður byrjaði árið við at leypa á fjølmiðlarnar, vildi vera við, at tíðindi verða "latin í ein so neiligan og negativan ham sum gjørligt." Fremsta dømi: at fjølmiðlar siga fíggjarlógina ikki at hanga saman, tí bygnaðarbroytingar ikki eru framdar. Tá ið nýggja játtanarskipanin krevur, at fíggjarlógin verður til í skipaðari tilgongd og at enda verður "grundað á veruleikakendar vónir og hollar ætlanir" – so kundu veruliga neiligir miðlar saktans sakliga funnið onkra verri orðing um hesa fíggjarlóg, sum endaði við, at fleiri enn 200 konti á fíggjarlógini vórðu skornar við ávísum prosentum – uttan nakað ið við meining kann lýsast sum "veruleikakendar vónir og hollar ætlanir." Samgongan hevur samtykt nakrar fáar fíggjarligar sparingar ið koma sera óvart á borgaran. Men almenni bygnaðurin er óbroyttur, skerdur nøkur prosent, men bygnarðarliga óbroyttur.

At fjølmiðlar ivast í, um lógin um innskjótaratrygd verður dagførd rættstundis, er neyvan so løgið heldur. Landsstýrið megnar sera illa at røkja skyldur sínar í so máta. Hygg at fyrningarlógini, sum Eidesgaard goymir seg aftanfyri í TAKS-málinum – hon er frá 1908 og lítið broytt. Vit hava enn ikki fingið realkreditt, vit mangla enn leigulógina, sakna lutaíbúðir osfr. osfr. Landsstýrismaðurin kann suffa eitt sindur og royna at greiða frá einaferð enn, men at leggjast á fjølmiðlarnar á henda hátt, hoyrir ikki heima í norðurlondum.

Hygg at TAKS-málinum. Har er Eidesgaard farin út við, at "TAKS hevur sum øll onnur rættin at royna eitt ivamál," og at góður siður er ikki at leggja seg út í rættarmál. Her høvdu veruliga neiligir miðlar givið (seinna) gula kortið. TAKS er myndugleiki og hevur ikki rættindi. Borgarar hava rættindi, sum fíggjarmálaráðharrin ikki vil viðurkenna. Tá ið kærunevndin hevur talað, eigur TAKS at útføra tey boðini. Treytaleyst. Eisini sjálvt um ivamálið um heimildina verður roynt í hægri rætti. Tá ið landsstýrismaðurin góðkennir, at kærumál steðga fyrningini av TAKS-krøvum, so má landsstýrismaðurin eisini staðfesta, at kærumál steðga fyrningini av borgarans kravið um afturgjald frá TAKS. Fíggjarmálaráðharrin má gevast at góðkenna drál og nøl sum almennan politikk, má gevast við at greiða frá, at borgarin onki merkti til óheimilaða skattin. Jú, Eidesgaard – hevði neiliga pressan víst á – hesar upphæddir merkjast, og tú kanst ikki leypa um stranga dupulta kravið um heimild eftir stýrisskipanini og bíða stovnar tínar krevja nokk inn, 'bara fólk ikki merkja tað!'

**Hann fløvar seg við minnini**

Bæði løgtingsgranskoðanin og landsstýrismálanevndin hava staðfest, at Eidesgaard hevur mishildið skyldur sínar sum løgmaður og sum fíggjarmálaráðharri, men tær vilja ikki reisa ákæru. Veruliga neiligir fjølmiðlarnir høvdu ikki givist at kanna hetta, bert tí Hans Pauli Strøm var offraður.

Sum floksformaður kvetti Eidesgaard við Sosialin. Blaðið gjørdist hareftir ein tann mest framúrskarandi miðlafyritøkan. Meðan hini bløðini rapaðu, megnaði Sosialurin at økja virksemið, stovna aðrar miðlar og gera alternativt útvarp ið er vorðin berandi veggur í demokratiska orðaskiftinum. Samstundis megnaði leiðslan at halda fast í hugsjónir sínar og skrivar betri leiðarar enn nakrantíð við støði í dagførdari samhaldsfastari stevnu. Men stevnan hjá Sosialinum virkar helst sum ringa samvitskan hjá einum afturlítandi partíbossi ið fløvar seg við minnini... Men klantra tey fyri negativa ringrás? Nei, blaka ikki við gróti, Eidesgaard, tú starvast jú sjálvur í glashúsi!

# Nationalisman við satelittum

HERI MOHR



Í meira enn tíggju ár hava loysingarfólk á tingi og í fjølmiðlum – privatum og almennum – jabbað og júkað upp í saman um ta "oyðileggjandi og niðurgerandi" almennu fígging av okkara heilsuverki og almannaverki, sum, sambært galdandi lógum, verða fíggjað av landskassanum og ríkiskassanum í felag.

Teirra ørvitistos, t.d. lesarabrævið "Blokkerandi blokkmytan" í bløðunum fyri einari viku síðani, kann ikki skiljast øðrvísi enn, at øll almenn fígging av sjúkrahúsum, heilsuverki, almennum pensiónum og serforsorg eigur at verða lækkað við 616 milliónum ongantíð ov skjótt, helst her og nú. Tað er ikki ræðandi at lesa og hoyra, hvussu framtíðin hjá gomlum, sjúkum, avlamnum og brekaðum fer at mynda seg, um tað nationalistiska paradísið í Føroyum verður avgreitt sum ein hastisak og sett á stovn.

Loysingarfólk stara seg blind á "fenomenið" ríkiskassablokkin sum verandi rótin til alt ónt. Vit eiga tó ikki at gloyma, at loysingarfólk á tingi atkvøddu fyri at fáa blokkskipan við ríkiskassan, og at eingin blokkskipan var áðrenn 1. januar 1988. Nú rópa hesi somu fólk seg hás um, at blokkurin var orsøkin til, at peningakervið og samfelagið alt fór á heysin í 1992. Tá hevði blokkurin 5 ár á baki. Ikki eru tey smæðin.

Í 1951 hendi nakað tað sama sum í 1992. Samfelagið skramblaði; fólk í túsundatali flýggjaðu av landinum, arbeiðsloysið var methøgt. Nationalistarnir róptu seg hásar um fólkaatkvøðuna 1946. Ongin blokkur var at skylda uppá. Nationalistarnir itu tá Fólkaflokkur, sum mundi fingið reinan meiriluta á tingi í 1943. Nú eita teir Tjóðveldi við satelittum, sum eisini rópa seg hásar um somu fólkaatkvøðu og loysing. Harrin viti, hvussu skilið hevði verið í Føroyum, um loysingin hevði verið framd í 1946. Fimm ár seinri, í 1951, fór alt á húsagang (tó ikki landskassin), og fólk rýmdu í túsundatali av landinum.

Í 1951 og 1992 fingu vit professionella vegleiðing og hjálp úr Danmark; - men frá loysingarfólki hoyrdist og hoyrist einki uttan garteran. Orðið takk er ein býur í Russlandi.

Í roynd og veru er føroyskur politikkur fótatraðk í 100 ára gomlum ringi, sum gerst alt meira ekstremur og veruleikafjarur.

Hendan paranoia blokkfiksering loysingarmanna er beinleiðis fordummandi. Um hann, ið hetta skrivar, ikki áhaldandi í skrift og talu hevði upplýst fólk um blokkin – og ament sett spurningar til politikarar blokkinum viðvíkjandi uttan tó at fáa nakað svar – so varð eingin sannleiki kunngjørdur Føroya fólki um hesa skipan, sum eigur ein týðandi leiklut í tí føroyska samfelagnum. Tað er eitt sjúkt samfelag, sum ikki tolir sannleikan.

Í 1998-2003 høvdu vit eitt loysingarlandsstýri, sum drenaði 100-tals milliónir úr blokkinum. Hetta hendi 1. januar 2002. Við støði í landskassans almennu roknskapum ber til at gera sammetingar viðvíkjandi nýtslu av skattaborgaranna peningi í 1997 og 2003:

| | 1997 | 2003 |
|---|---|---|
| Landsskattur | 0.8 mia. | 1.4 mia. |
| Blokkur | 0.9 " | 0.6 " |
| Almanna-og heilsuverk | 1.2 " | 1.7 " |
| Almennar lønir | 0.95 " | 1.6 " |

Sum tað sæst, so varð landsskatturin øktur við 75%, útreiðslur til heilsu- og almannaverkið øktar við umleið 40% og almennar lønir øktar við umleið 70%. Og hetta hendi sum sagt, meðan loysingarfólk ráddu fyri borgum.

Í 1999-2003 brúkti hetta sama landsstýrið umleið 170 milliónir til olju- og sjálvstýrismál (í 2003 broyttist sjálvstýrismál til løgmál við øktari játtan). Hesi bæði málsøki hvurvu við fíggjarlógini 2004.

Við løgtingssamtykt gav landsstýrið í 1999 út loysingarmanifestið Hvítabók, Føroyskt Fullveldi, og í 2000 gav landsstýrið út propagandaritið Frá heimastýri til fullveldi. Hesi puerilu speciali er áhugaverd lektura. Meira í dag enn fyri 10 árum síðani.

Men hvar gongur markið millum ta "følsku blokerandi blokkmytuna" og so alt hitt, sum ikki er í nakrari

*Framhald á næstu síðu*